# Hósdagur 18. mai

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Oddur Petersen í Sørvági lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.35 **Góðan Morgun Føroyar**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Oddur Petersen í Sørvági lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Fyri 100 árum síðani** (e) - Úr Føroyingatíðindum og Fuglaframa í árinum 1900. Sverri Egholm leggur til rættis.
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Tónleikur í trettan øldir** (e) - 9. sending hjá Kára Sverrissyni
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindini**
17.05 **Geykn** - Johannus Miðskarð og Maria Abrahamsen skipa fyri.
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Suni Merkistein stílar fyri
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Dalurin fagri** - 24. og seinasti partur av skaldsøgu eftir Gunnar Hoydal. Hans Tórgarð lesur.
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið** - Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
14.30 **Barnalindin**
17.00 **M & M's** - Sending fyri tannáringar
17.55 **Dagsins orð**
18.00 **M & M's** heldur fram
19.00 **Brot og bitar** - Ein øðrvísi tíðindasending
20.00 **Barnalindin**
20.30 **Okkara dagliga breyð** (e)
20.55 **Dagsins orð** (e)
21.00 **Bønarlinjan við gesti** - Bønarevni kunnu ringjast inn á tlf. 321377, Fax 321379.
24.00 (uml.) **Vit gevast**

**Rás 2** FM 102 FM 107

8.00 **Morguntónleikur** - Lættur blandaður tónleikur
9.45 **Orðið** - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Birgir Beinleiðis** - Beinleiðis sending við tónleiki og práti - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Dansitónleikur fyri vaksin**
13.00 **Føroyskur tónleikur**
14.00 **Laila Beinleiðis** - Beinleiðis countrysending
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Lættur tónleikur**
16.00 **KT R@sin** - Kunnandi ungdómssending fyri ung og eldri. - Um kunningartøkni í víðastu merking í samstarvi við Føroya Tele.
17.00 **Barnaløtan** - Oddbjørg og Lissi leggja til rættis
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Lættur tónleikur**
19.00 **Hans og Dýrini** - Hans Joensen prátar við fólk um dýr, náttúru og umhvørvi.
20.00 **Ungdómstónleikur**
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Orðið** (e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 **GirlZone** - Beinleiðis ungdómssending við gestum. - Anita Ottosen, Ruth Reinert og Súsanna Clementsen leggja til rættis. - Telefon: 359999, fax 359990 ella E-mail: ras2@ras2.fo
24.00 **Góða nátt**

**SVF**

18.30 **Øskufía** 19:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika** við Grannum Okkara
20.50 **SvF um SvF**
21.10 **Gekkur**
21.50 **Eiturkoppurin** 4:6 - danskt krimi- og kærleiksdrama - Óhóskandi fyri smábørn
22.50 **Krimitímin: Ruth Rendell — Thornapple**
23.40 **Liðugt**

**Eurosport**

7.30 **Cycling**
8.30 **Motorsports**
9.30 **Cart**
10.30 **Motocross**
11.00 Live - **Boxing**
12.30 **Mountain Bike**
13.00 **Tennis**
14.30 Live - **Cycling**
15.56 **News**
16.00 **Motorsports**
16.30 Live - **Boxing**
17.56 **News**
18.00 **Tennis**
19.00 Live - **Tennis**
20.30 **News**
20.34 **Judo**
21.30 **Boxing**
22.30 **News**
22.36 **Tennis**
23.30 **Motorsports**
0.00 **Motocross**
0.30 **Close**

**TV3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.05 **TV-shop**
9.00 **Hvide Løgne**
9.25 **Alle tiders barnepige**
9.55 **Baywatch**
10.50 **Horton-sagaen**
11.40 **Horton-sagaen**
12.30 **I lyst og nød**
13.00 **Sjov og Spas**
13.25 **Panter-tanter**
13.55 **Det lille hus på prærien**
14.50 **Interne affærer**
15.45 **Sjov og Spas**
16.15 **Ricki Lake**
17.10 **Dagens Nyheder på TV3**
17.20 **Sportsnyheder**
17.25 **Vejret**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Vild med dig**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Jacob og Lotte på eventyr**
19.35 **Family Law**
20.35 **Modelliv**
21.05 **Heksene fra Warren Manor**
22.05 **SexOrama**
22.40 **Dagens Nyheder på TV3**
22.50 **I lyst og nød**
23.20 **Vore værste år**
23.50 **Ti tommelfingre**
0.20 **Monty Pythons flyvende cirkus**
0.55 **Ellen**
1.15 **Far er major**
1.45 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.15 **Viruskrigerne**
3.10 **Hvide Løgne**
3.40 **Godnat**

**BBC World**

0.00 **News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **The Travel Show**
2.00 **News – Weather**
2.30 **Reporters**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **News – Weather**
6.30 **The Money Programme**
7.00 **News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **News – Weather**
8.30 **Talking Movies**
9.00 **News – Weather**
9.30 **The Money Programme**
10.00 **News – Weather**
10.30 **HARDtalk**
11.00 **News – Weather**
11.30 **The Travel Show**
12.00 **News – Weather**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **News – Weather**
13.30 **HARDtalk**
14.00 **World News**
14.15 **World Business Report – Weather**
14.30 **Top Gear**
15.00 **News – Weather**
15.30 **The Money Programme**
16.00 **News – Weather**
16.30 **Asia Today**
17.00 **News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **World News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **World News – Weather**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **World News – Weather**
20.30 **Click Online**
21.00 **News – Weather**
21.30 **World Business Report**
22.00 **News – Weather**
22.30 **Panorama**
23.00 **News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC Prime**

1.00 **TLZ: »Come outside – Pencils«**
1.15 **TLZ: »Come outside – Soap«**
1.30 **TLZ: »Come outside – Street Lamps«**
1.45 **TLZ: »Come outside – Brushes«**
2.00 **TLZ: »South Korea – The Struggle for Democracy«**
2.30 **TLZ: »The True Geometry of Nature«**
3.00 **TLZ: »Empowerment«**
3.30 **TLZ: »Global Firms shrinking Worlds«**
4.00 **TLZ: »Greek Language and People«**
4.30 **TLZ: »Greek Language and People«**
5.00 **TLZ: »The Small Business Programme**
5.30 **TLZ: »Look ahead**
6.00 **Dear Mr. Barker**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Get your own back**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Susan Malone«**
8.20 **Real Rooms: »Solihull Fairytale Bedroom«**
8.45 **Kilroy: »I'm Gay and isolated«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Inspectors: »Salisbury«**
11.00 **TLZ: »Awash with Colour«**
11.30 **Can't Cook, Won't Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Real Rooms: »Worcester Open Plan Lounge«**
13.00 **Style Challenge: »Glass Artists«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Gardeners' World**
14.30 **Can't Cook, Won't Cook**
15.00 **Dear Mr. Barker**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Get your own back**
16.00 **The Biz**
16.30 **Classic Top of the Pops**
17.00 **Dad's Army: »Keep young and beautiful«**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Vets in Practice**
19.00 **Keeping up Apperances**
19.30 **The Brittas Empire**
20.00 **Casualty: »Seize The Night«**
21.00 **Ruby Wax meets: »Jerry Springer«**
21.30 **Classic Top of the Pops**
22.00 **All Things bright and beautiful**
23.25 **Songs of Praise**

***TV3 - Hósdagin kl. 19.00:***

## Jacob og Lotte på nye eventyr



Jacob og Lotte fara við ferjuni til Osla, og Jacob hevur staðið fyri bíleggingini. Eitt flott rúm til sín sjálvs, og eitt minni flott til Lotte. Lotte fær nú ikki nógv brúk fyri kamarinum, tí meðan Jacob liggur í seingini, stríðist Lotte í maskinrúminum.

Tíverri fyri Lotte hevur Jacob »gloymt« at gjalda rokningina, og so noyðist Lotte eisini inn at sita av hesum.

Bæði koma tey tó fram til Oslo. Lotte fer á fornminnisavn, meðan Jacob koyrir í sporvogni. Seinni hittast tey bæði á einum sletuheyggi nær við Holmekollen, og hetta sjálvandi við, at Lotte noyðist at bíða eftir Jacob, sum altíð er dekan ov seinur.

Eisini síggja vit tey á toppinum av Holmekollen, og Jacob fær ein sera spennandi túr niður aftur.



***TV3 - Hósdagin kl. 20.35:***

## Modelliv

Katrina fer nú undir at innflyta hattar saman við sheikinum, Lars. Foreldrini hjá Lauru hava vant seg við yrki hennara, men tey halda framvegis, at hetta er eitt ótrýgt tilverugrundarlag. Laura er á messu í Forum, har hon skal geav blómur til fyrsta luttakaran í Supermodel of the World 2000.

Tue fer í Bellacentrið, og hann noyðist at ásanna, at tað kann verða strevið at sláa til sum mannfólkamodel, og Anna kemur heim úr London, og fær ein ordiligan vals frá Jaqueline. At enda síggja vit eisini Nadia verða innkallaða til skúlastjóran, tí frávera hennara er alt ov stór.

***TV3 - Hósdagin kl. 21.05:***

## Heksene fra Warren Manor



Amerikonsk sendirøð

Phoebe finnur ræðslusligin út av, at hon eisini var á lívi í 1920'unum, og at hon tá var ein ræðulig heks, sum eisini var saman við einum eirindaleysum gandakalli, og vildi drepa Prue og Piper. Fyri at forða fyri, at nakað tílíkt skal endurtaka seg, noyðist hon aftur til 20'ini, har hon skal finna eitt serligt hálsprýði, sum kann verja hana, men talan verður ikki um nakra vandaleysa ferð.



***TV3 - Hósdagin kl. 22.05:***

## SexOrama

SexOrama fer við donsku striparinnuni og nakinmodellini, Terese, á sexferð til »Red light distrikt« í Amsterdam, sum er heimskent fyri allir gleðisgenturnar, sum eru at síggja í vindeygunum fram við kanalunum. Í Amsterdam hittir 21-ára gamla keypmannahavnargentan altjóða pornostjørnuna, Helen Duval, sum greiðir frá um sína yrkisleið. Eisini sær hon eitt pornoshow við ensku Christie, sum greiðir henni frá nøkrum frekum snildum. Terese fær eisini sjálv møguleika at dansa á kendasta sex-pallinum í Amsterdam, Casa Russo, har bæði hálendsk og útlendsk sexlistarfólk framføra hard-core shows hvørt kvøld.





# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Jákup er 17 dagar frá DM heitinum

***Superligan:** Todi Jónsson skoraði, tá hann var á veg av vøllinum, tí hann var skaddur í fingrinum*



*Sum gongdin er í løtuni, sleppur Jákup Mikkelsen helst skjótt at skriva nógvar autografar afturat*

Mikukvøldið gjørdist tað meiri sannlíkt, enn tað hevði verið frammanundan, at fyrsti føroyingurin nakrantíð skal vera við til at vinna ein fótbóltsmeistaraskap uttanfyri landoddarnar.

Jákup Mikkelsen og hinir í Herfølge vunnu trý stig mikukvøldið. Kappingarneytarnir úr Brøndby vunnu eisini trý stig. Teir vóru aftanfyri 1–0, men teimum eydnaðist í 2. hálvleiki at skora tvey mál móti OB. Munurin millum Herfølge og Brøndby er framvegis eitt stig. Herfølge hevur 50 stig, og Brøndby hevur 49 stig.

Síðstu vikurnar hevur verið roknað við, at meistaraliðið frá í fjør, AaB, fór at stinga seg upp í kappingina um DM, men nú er sannlíkið minni fyri hesum. AaB tapti mikukvøldið 2–0 á heimavølli móti AB. AaB hevur 45 stig.

Úrslitini mikukvøldið bera við sær, at tað tykist rættuliga sannlíkt, at Herfølge undir øllum umstøðum fer at fáa okkurt slag av heiðurskrónum. Síðani vetrarsteðgin hevur hetta verið málið hjá John Faxe Jensen og spælarunum, og nú tykist spurningurin vera, hvussu fínar krónurnar verða.

– Nú tykist tað greitt, at tað verður eitt felag, sum spælir í gulum og bláum búnum, sum fer at vinna meistaraskapin, helt Herfølge venjarin, sum áður hevur spælt í Brøndby, fyri eftir sigurin í Vejle. Við útsøgnini sipaði hann til, at bæði Herfølge og Brøndby spæla í gulum troyggjum og bláum buksum:

– Eg eri als ikki bangin fyri at siga, at eg nú rokni við, at vit fara at vinna okkurt slag av heiðurskrónum. Um vit døma út frá dystunum, sum vóru sunnudagin og teimum í kvøld, so haldi eg, at vit hava víst bestu avrikini, helt Herfølge venjarin mikukvøldið.

### Brøndby torførari uppgávur

Tað hevur verið eyðkent fyri hetta kappingarárið í Danmark, at øll liðini í superliguni hava verið óstøðug. Soleiðis tykist tað framvegis vera, og tað vil við øðrum orðum siga, at tað kann roknast við øllum í teimum fýra umførunum, sum eru eftir at spæla. Men um dystirnir verða sammettir, sum ávikavíst Herfølge og Brøndby hava eftir at spæla, so kundi tað sæð út til, at tað er Brøndby, sum eigur torføraru uppgávurnar á.

Sunnudagin 28. mai verður 33. og síðsta umfarið spælt. Tann dagin fær Herfølge vitjan av FCK. Nú sunnudagin skal Herfølge spæla í Esbjerg, annan sunnudag fáa teir vitjan av OB, og í næstsíðsta umfarinum, sum verður 25. mai, verður avbjóðingin stór hjá Herfølge, sum skal spæla í Silkeborg.

Brøndby skal nú sunnudagin spæla í Silkeborg. 21. mai fær Brøndby vitjan av FCK, 25. mai skal Brøndby spæla á útivølli móti AB, og í 33. og síðsta umfarinum fær Brøndby vitjan av AaB.

### Todi skoraði við skaddum fingri

Sunnudagin var Todi ikki millum teir fyrstu ellivu hjá FCK. Mikukvøldið var FCK í Viborg, og tá hevði Todi fingið fremsta álopsplássið aftur.

Fyri fyrstu ferð síðani vetrarsteðgin kom Todi Jónsson á málskjúttaralistan. Málið var eitt sindur undarligt upp á fleiri mátar. Dysturin var bara eitt korter gamal, tá Todi fekk ein snudd í ein fingur. Teir lappaðu fingurin saman, men tað var týðuligt, at Todi, sum var við í uppspælinum til fleiri álop og sum legði góð hornaspørk og fríspørk innfyri, var so mikið darvaður, at hann ikki fekk spælt.

Tá hálvur tími var farin, var David Nielsen, sum hevur verið í øðini í einar tvær vikur, varð settur at hita upp. Ætlanin var, at hann skuldi koma inn fyri Toda Jónsson, tá tað restaðu fýra minuttir av fyrra umfarinum. Men so fekk FCK fríspark eitt sindur frammanfyri miðstrikuna í vinstru. Todi Jónsson streyk av stað í høgru, frísparkið varð sent til hansara, meðan mótstøðumenninir ætlaðu at fyrireika seg. Temjingin hjá Toda var góð, hann læt bóltin støkka eina ferð í brotsteiginum, áðrenn hann smekkaði flatt framvið málverjanum. Og eftir at hann var fagnaður av viðspælarunum fyri fyrsta málið í landskappingini í ár 2000, fór Todi av vøllinum.

Í 2. hálvleiki helt FCK yvirvágin fram. Eingin hevði havt nakað at viðmerkja, um teir høvdu vunnið við tveimum ella trimum málum. Men tað gjørdu teir ikki. Royndirnar móti málinum vóru ússaligar, og spælið líktist mest av øllum innandura fótbólti. Í staðin javnaði Viborg í síðsta minuttinum. Teir skoraðu uppá eitt púrasta óneyðugt brotsspark, sum Niclas Jensen var meistari fyri.

Hevði eydnan havt verið við, so hevði FCK havt vunnið trý stig sunnudagin í Parkini móti AaB og aftur trý stig mikukvøldið. Tann úrtøkan hevði havt við sær, at teir høvdu havt verið við í kappingini um bronsukrónurnar og harvið pláss í Europa Cup. Nú verður tað neyvan meiri enn eitt pláss í miðjuni.

### Summarfótbóltur

Mikukvøldið var tað summarveður í Nørreskóginum, sum er karmur um fótbóltsstadionið í Vejle. Og kanska var hitin orsøkin til, at ferðin í spælinum ikki var serliga høg, og at royndirnar móti málinum vóru fáar. Fyrsta royndin móti málinum hjá Jákupi Mikkelsen var, tá átjan minuttir vóru farnir, og eyðkennið fyri flestu royndirnar var, at tær vóru rættuliga forkølaðar.

Vejle hevði bóltin meiri enn Herfølge, og teir vóru onkrar ferðirnar einsamallir við Jákupi Mikkelsen, sum røkti sína uppgávu til lítar.

Vejle er illa spert í botninum. Hjá teimum ráddi um at leypa á og vinna, og so gekk beint øvugt. Herfølge, sum hevði trygga verju og lúrdi eftir møguleikum upp á snarálop, fekk tvey mál í 2. hálvleiki. Hitt fyrra stútaðu teir, tá 67 minuttir vóru farnir, og hitt seinna skoraðu teir fýra minuttir seinni.

### Valsurin hjálpti

Óli Johannesen er á Tvøroyri, men sjálvandi fylgir hann væl við, hvussu tað gongst hjá AGF, sum hann framvegis hevur sáttmála við og ætlar sær at spæla við eftir summarsteðgin.

Nú bendir nógv á, at AGF eisini í nýggja kappingarárinum fer at vera í superliguni. Síðani Lars Lundquist og Kent Nielsen tóku venjaraábyrgdina á seg hevði AGF undan mikukvøldinum vunnið tríggjar heimadystir, meðan teir høvdu tapt fýra útidystir. Sunnudagin taptu teir stórt í Odense, og undan heimadystinum mikukvøldið móti Silkeborg fjaldu venjararnir ikki, at teir vóru so misnøgdir við fleiri spælarar sunnudagin, at teir høvdu boðað teimum frá, at um hugburðurin ikki var ein heilt annar mikukvøldið, so fór tað at fáa avleiðingar.

Valsurin tóktist at hava hjálpt. AGF legði nógva orku í, og teir vunnu 2–1. Stig Tøfting, sum er komin úr Týskalandi, hevur stóran týðing á miðvøllinum, og hesa ferð skoraði hann eitt gott mál upp á langskot.

AGF er fimm stig frammanfyri Vejle, sum er næstniðasta plássinum. Men AGF hevur spælt ein dyst meiri enn Vejle. Munurin í dystartalinum verður útjavnaður komandi sunnudag. Tá spæla øll liðini í superliguni uttan FCK og AGF, sum spældu innanhýsis uppgerðina mikukvøldið í síðstu viku.

JH

**Úrslit, Superligan**

| | | |
|---|---|---|
| 10.05 | AGF-Silkeborg | 2-1 |
| 10.05 | Aab-AB | 0-2 |
| 10.05 | Brøndby-OB | 2-1 |
| 10.05 | Vejle-Herfølge | 0-2 |
| 10.05 | FC København-Viborg | 1-1 |

**Komandi dystir**

| | |
|---|---|
| 14.05 | Aab-Vejle |
| 14.05 | AB-Viborg |
| 14.05 | Esbjerg-Herfølge |
| 14.05 | OB-Lyngby |
| 14.05 | Silkeborg-Brøndby |

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 29 | 15 | 5 | 9 | 45 | 43 | 2 | 50 |
| 2 | Brøndby | 29 | 14 | 7 | 8 | 53 | 33 | 20 | 49 |
| 3 | AaB | 29 | 11 | 12 | 6 | 47 | 30 | 17 | 45 |
| 4 | Silkeborg | 29 | 12 | 7 | 10 | 44 | 31 | 13 | 43 |
| 5 | Viborg | 29 | 12 | 7 | 10 | 42 | 42 | 0 | 43 |
| 6 | FCK | 30 | 12 | 6 | 12 | 41 | 33 | 8 | 42 |
| 7 | AB | 29 | 11 | 9 | 9 | 40 | 33 | 7 | 42 |
| 8 | Lyngby | 28 | 12 | 4 | 12 | 42 | 45 | -3 | 40 |
| 9 | OB | 29 | 9 | 9 | 11 | 33 | 37 | -4 | 36 |
| 10 | AGF | 30 | 9 | 7 | 14 | 33 | 48 | -15 | 34 |
| 11 | Vejle | 29 | 6 | 11 | 12 | 35 | 56 | -21 | 29 |
| 12 | Esbjerg | 28 | 7 | 4 | 17 | 31 | 55 | -24 | 25 |